# Mín allarfyrsta Bíblia

BÓKAÚTGÁVA
*tíðindaskriv*

Føroya Skúlabókagrunnur hevur givið nýggja barnabíbliu út til tey smærru børnini, Mín allarfyrsta Bíblia. Bókin er komin út í samprenti við enska forlagið Lion Publishing. Kendur enskur høvundur innan andaligar bókmentir, Lois Rock, hevur endursagt søgurnar til smáu børnini. Hon hevur skrivað meira enn 30 bøkur, ið eru týddar til nógv ymisk mál. Alex Aycliffe hevur myndprýtt bókina. Hon er somuleiðis kendur myndprýðari í Onglandi og hevur vunnið heiðurslønir. Charlotta Thorsteinsson, lærari, hevur týtt bókina úr enskum.

Í bókini eru 20 lyklasøgur úr Bíbliuni, 10 úr Gamla Testamenti og 10 úr Nýggja Testamenti. Høvundurin hevur verið trúgvur mótvegis upprunatekstinum og hevur hartil fingið moralska og andaliga boðskapin við á ein einfaldan hátt. Teksturin er lættur at lesa. Lítið av teksti er á hvørjari síðu, og ger hetta bókina saman við prýðiligu og livandi myndunum sera væl egnaða til smærru børnini. Myndirnar eru litríkar. Hóast tær eru einfaldar, siga tær greitt sína egnu søgu.

Hetta er ein bók, ið vaksin kunnu lesa fyri børnunum. Í skúlahøpi kunnu byrjanarlesararnir lesa hana sjálvir, umframt at nógv tilfar er at tosa um í skúlastovuni. Aftast í bókini er evnisyvirlit við frágreiðingum um, hvar ber til at lesa um ymisku evnini.

Mín allarfyrsta Bíblia er 257 blaðsíður og kostar 148,00 krónur. Hon fæst í bókabúðunum um alt landið.

# Ferðabrúgv og kunningarstøð skulu hjálpa tónleikinum



*Bjarni Djurholm fekk hósdagin eitt álit um rútmiskan tónleik í Føroyum, sum kemur við fleiri ítøkiligum tilráðingum um, hvussu føroyskur tónleikur kann mennast*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Nýggja álitið um rútmiskan tónleik kemur við fleiri ítøkiligum tilráðingum um, hvussu føroyskur tónleikur kann taka nøkur stig rætta vegin, og hvussu Føroyar kunnu fáa meira burtur úr tí tónleikaliga tilfeinginum**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Hósdagin handaði stýrisbólkurin, sum í hálvtannað ár hevur endavent føroyskum tónleikalívi, landsstýrismanninum við vinnumálum eitt álit, sum millum annað inniheldur fleiri ítøkiligar tilráðingar um eina menning av føroyskum tónleiki.

Ferðabrúgv, kunningarstøð, spælistað, venjingarhøli og stuðul eru nøkur av lyklaorðunum í tilráðingunum, men tónleikararnir fáa eisini at vita, at teirra innsatsur er avgerandi fyri úrslitið.

– Avbjóðingin at røkka málinum liggur fyrst og fremst hjá tónleikaranum sjálvum. Tað eru nøkur, ið trívast væl við avbjóðingini og ikki falla í fátt av forðingunum á vegnum. Tey, sum vit í dag kunnu rópa stjørnur, eru ikki borin á lógvum. Tey hava bara onkursvegna neyðuga blandið av góðum evnum, treiskni, sjálvsvirði, arbeiðshugi og persónsmensku saman við tí vetinum av hepni og tilvild, sum skal til, stendur at lesa í álitinum.

## Kunnu ikki renna undan tónleikinum

Men arbeiðsbólkurin leggur eisini dent á, at politiski myndugleikin skal spæla við, um tað skal verða ein verulig menning í føroyskum tónleiki.

– Størstu avbjóðingina hevur tó politiski myndugleikin, sum onkursvegna ikki kann renna undan øllum skapanarhuginum og tónleikavirkseminum, sum er her heima. Ein verður noyddur at hugsa um tey nógvu í breiddini fyri at fáa ágóðan av teimum fáu í hæddini, skrivar arbeiðsbólkurin í álitinum og heldur fram:

– Hvussu politiski myndugleikin tekur við avbjóðingini veldst um, hvørji mál hann setur sær. Avbjóðingin liggur eisini í at finna javnvágina ímillum at blanda seg upp í og blanda seg uttanum. Tónleikurin og tónleikarin trívast væl í andstøðu við umheimin, men hann má samstundis hava virðing, stuðul og karmar, fyri at honum skal vera lív lagað.

– Uttan bygnað og politisk stevnumið leggja vit alt í hendurnar á einstøkum eldsálum og tilvildini. Eldsálir kunnu slokna undir trongum korum, og tilvildini kunnu vit ikki rokna við ella gera íløgur í. Við einum bygnaði eru karmarnir støðugir og áhaldandi, samstundis sum rúm er fyri eldsálunum, ið veruliga skulu til at skapa menning og trivnað.

## Savnandi kunningarstøð

Í álitinum, sum hevur heitið »Rútmiskur tónleikur í Føroyum« eru fleiri tilráðingar um, hvussu heimliga tónleikalívið og sambandið við útheimin kann mennast. Ein av tilráðingunum er ein ferðabrúgv, tey kalla, og hendan brúgv snýr seg um, at tað skal verða lættari og bíligari hjá føroyskum tónleikarum og bólkum, sum skulu uttanlands at spæla, at ferðast aftur og fram. Ein serligur grunnur kundi tikið sær av hesum, men neyðugt er við samstarvi við tey, sum flyta fólk til og úr Føroyum – Atlantic Airways og Smyril Line, fyrst og fremst.

Arbeiðsbólkurin mælir eisini til, at ein serlig kunningarstøð verður gjørd, sum skal venda sær til útheimin við føroyskum tónleiki, men sum eisini skal virka savnandi fyri føroyskan tónleik.

– Føroyar hava brúk fyri einum sýnisglugga út í heim og umboðum í altjóða netverkum og sølustevnum fyri at menna møguleikarnar hjá føroyskum tónleikarum og tónleiki at koma longri út. Samstundis er stórur tørvur á einum miðsavnandi regnskjólssamtaki, sum hevur til endamáls at savna vitan og upplýsingar til og um føroyskar tónleikarar og veita kunning um millum annað marknaðarførslu, heldur arbeiðsbólkurin.

Harafturat verður eisini mælt til, at fleiri venjingarhøli verða tøk til tónleikabólkar, at høvuðsstaðurin fær eitt serligt spælistað, at ein serligur tónleikaportalur verður gjørdur á netinum, sum skal vera sýnisgluggi fyri føroyskan tónleik, at ein serligur dagur í árinum verður brúktur til at varpa ljós á tónleikin kring landið, og at stuðul verður veittur føroyskum útgávufeløgum, sum royna at selja føroyskan tónleik í útheiminum.

## Álit um rútmiskan tónleik

Seint á heysti 2003 tóku Vinnuframagrunnurin og Mentamálaráðið stig til leingi ætlaða útgreining av umstøðum, møguleikum og forðingum hjá rútmiskum tónleiki í Føroyum. Hvør í sínum lagi stuðla stovnarnir menning av tónleikavirksemi, men teir halda ikki, at stuðulskipanir teirra eru grundfestar í greiðari fatan av, hvar almennur peningur munar mest.

Dentur varð lagdur á, at greiningin varð gjørd í samstarvi við fólk innan fyri tónleikin. Fekst eitt umfatandi samstarv við hesi, kundi arbeiðið stuðla undir fruktagott samstarv við og innan fyri tónleikavinnuna frameftir.

At skipa fyri verkætlanini varð stýrisbólkur settur, og Urd Johannesen varð biðin at standa fyri verkætlanini.

**Í stýrisbólkinum vóru hesi umboð**
Kjartan Kristiansen, Menningarstovan, formaður í stýrisbólkinum
Fróði Vestergaard
Gissur Patursson, Vinnuframagrunnurin
Jákup Zachariassen
Jóan Petur Hentze, Mentamálaráðið
Kristian Blak, LISA